

Greinin er partur av lýsingarherferð, sum Granskingarráðið stendur fyri

# HVØRJI ORÐ L VIT FYRST?

Sigur barn títt »lulla«, »dada« og »nallin«? So líkist tað øðrum vøggustovubørnum, ið eru í ferð við at læra seg málið. Hóast hetta er smábarnamál og ikki røttu orðini, eru tað orð sum hesi, ið eru partur av orðfeinginum hjá føroyskum børnum. Sissal M. Rasmussen, ph.d-lesandi, hevur í sambandi við ph.d-verkætlan sína granskað í, hvussu føroysk børn læra málið. Serliga hevur hon áhuga í týdninginum, sum máltøka hjá børnum hevur fyri børnini eisini seinni í lívinum

EILEN ANTHONIUSSEN

Sissal M. Rasmussen hevur seinastu trý árini arbeitt við umfatandi gransking av føroyska málinum. Hon hevur sett sær fyri at kanna, hvussu føroysk børn læra sítt móðurmál.

– Mín áhugi fyri máli byrjaði her á Føroyamálsdeildini, og seinni havi eg tikið útbúgving í audiologopedi á Københavns Universitet. Síðani starvaðist eg hjá Sernámi í 10 ár, har málið var ein grundleggjandi partur av arbeiðnum, og av tí at vit vita so lítið um málið hjá føroyskum børnum, fekk eg hugskotið at fara undir at granska í málinum og søkti Granskingargrunnin um stuðul.

Fyri at fáa eina so fullfíggjaða mynd sum gjørligt, setti Sissal sær fyri at byrja við byrjanini og valdi at kanna orðfeingið hjá teimum allaryngstu.

– Eg fekk fatur í listanum frá Landsfólkayvirlitinum við børnum, sum vóru fødd í tíðarskeiðnum, ið svaraði til átta mánaðir til trý ár, og fann fram til foreldur, sum eg so kundi seta meg í samband við. Síðani havi eg býtt børnini upp í tvey, tey smærru í aldursbólkin 8-16 mánaðir og tey eldru í 16 mánaðir til trý ár.

Tá foreldrini høvdu játtað at vera við, luttóku foreldrini umvegis netið í kanningini, har foreldrini skuldu krossað av, hvørji orð barnið skilti, og um tey dugdu at siga orðið, og at enda vórðu tey spurd, um barnið dugdi at seta orð saman til setningar. Harumframt vóru aðrir spurningar um barnið, sum hava týdning fyri máltøkuna, til dømis um barnið hevði systkin, gekk á stovni og so framvegis. Øll svarini eru dulnevnd.

> »
>
> *Tað er púra normalt ikki at siga nakað, tá barnið er eitt ár ella hálvtannað, men man skal sum foreldur fylgja við. Tá tey eru millum hálvtannað og tvey ár fara tey flestu inn í ein orðaspurt, sum setir ferð á orðfeingið*
>
> *Sissal M. Rasmussen*

### Hví er mál týdningarmikið?

– Eg havi valt at brúka eitt háttalag, sum er brúkt í sambandi við gransking í 60 øðrum londum, har eg havi hugt eftir orðfeingi og samanborið við, hvussu skjótt føroysk børn læra orð, og hvussu skjótt tey læra seg fleiri orð og so framvegis.

Sissal greiðir frá týdninginum av at menna málið.

– Tá barnið kennir fleiri orð, hevur tað nógvar fyrimunir við sær. Jú fleiri orð barnið kennir, jú skjótari gongur at læra enn fleiri orð. Samskifti er í hesum aldrinum av størsta týdningi, og jú meiri samskifti barnið hevur við onnur bæði børn og vaksin, jú skjótari læra tey mál og nýggj orð. Og tað er ikki minni týdningarmikið, tá barnið fer í skúla og skal læra at samskifta um evni, sum liggja uttan fyri heimið.

Men fyri at kunna siga nakað um hetta evnið, er umráðandi at finna út av, hvussu máltøkan hjá føroyskum børnum vanliga fer fram. Út frá svarunum, sum foreldrini hava latið henni aftur, kann hon seta orðfeingið hjá børnunum inn í skipanir, sum geva eina mynd av máltøkuni hjá føroyskum børnum.

– Hetta er gransking, sum vísir týðilig úrslit. Her síggi eg ítøkiliga, hvørji orð tey læra fyrst, hvat eyðkennir hesi orðini, og so kann eg út frá svarunum spyrja, um tað er okkurt í okkara umhvørvi, sum ger hetta? Av tí at sera nógv børn eru við í kanningini, kunnu kanningar sum hesar geva eina greiða ábending um íkastið tey fáa frá umhvørvinum rundan um børnini. Til dømis síggi eg, at børn duga líka væl orð sum »seyður« og »grísur«, hóast børnini í veruliga umhvørvinum her í Føroyum síggja fleiri seyðir enn grísar, og hetta kemst av, at tey síggja grísar í bókum, teknifilmum og aðrastaðni. Sostatt kann íkast til børn vera so nógv, bæði tað sum vit tosa um, og tað sum tey hoyra, síggja og uppliva.

– Hyggja vit at djórum, sum liva her í Føroyum, eitt nú »lundi« og »hvalur«, so síggja vit, at hesi ikki eru serliga væl umboðað í barnabókum og teknifilmum. Havast skal í huga at hetta eru børn undir trý ár, sum kanska ikki síggja hesi djór í »veruleikanum« í Mykinesi ella í grindadrápi. Her kann ein orsøk vera, at íkastið bæði í gerandisdegnum og í bókum og teknifilmum er minni, og tí fáa tey færri upplivingar við hesum orðum, tí tey duga onnur orð betri sum til dømis pingvin ella krokodilla.

### Babba kemur fyrst

Hjá teimum heilt smáu kann hon greina seg fram til smálutir og ljóð. Eitt nú eru »m« og »b«-ljóðini tey fyrstu ljóðini, ið børn læra, og tað gera børnini eisini í londunum rundanum okkum. Sissal vísir á, at tað at brúka barnamál sum »lulla«, »dada« ella »nallin« eisini er partur av menningini hjá føroyskum børnum.

– Millum fyrstu veruligu orðini er »babba« eitt sum gongur aftur. Men »mamma« er eisini væl við, skundar hon sær at siga.

Tað eru nógv viðurskifti, ið gera seg galdandi, tá tað snýr seg um máltøku hjá børnum. Um børnini hava haft millumoyrabruna, um tey hava eldri systkin, hvussu nógv tey eru á stovni, hvussu nógvar bøkur tey hava heima, hvussu nógv tey vaksnu lesa fyri teimum og so framvegis.

– Tað er í veruleikanum ótrúligt, hvussu skjótt børn læra mál. Men tey skulu hava íkast, og tí er umráðandi at hyggja at viðurskiftunum rundan um barnið. Hvussu nógv mál tey tosa í heiminum til dømis. Harafturat er tað munur á gentum og dreingjum, og tað hevur eisini týdning, tá ein skal hyggja eftir tølunum, sum vísa hvussu nógv tey duga, og um tey eru á hædd við hini børnini.

Børn skilja, áðrenn tey tosa, og

# ÆRA



**VÍSINDA-VØKAN 2016**

Greinin er skrivað í sambandi við ársins **Vísindavøku**, sum verður í Perluni og Reinsarínum í Tórsgøtu í Tórshavn. Vísindavøkan verður **fríggjadagin 30. september** frá kl. 8.00 á morgni til á leið kl. 22.30 á kvøldi.

Ymsar framsýningar og **samvirkin tiltøk** vera í Perluni og á Torginum. Hesi verða skipað kring frumevnini **eld, luft, vatn og jørð**. Her verður alt møguligt **frá fiski til dronur** at síggja, hoyra um, smakka og nerta við.

Framløgur, sum serliga eru ætlaðar miðnámsskúlanæmingum, verða í Reinsarínum fyrrapartin.

Lærarar og næmingar úr Hoydølum fara at hava ymiskt á skránni **til børn** í einum telti á p-økinum yvirav Reinsarínum.

Steðgur verður millum kl. 15.00 og 17.30, tá **Arkitekturdagarnir**, sum Arkitektafelag Føroya skipar fyri, verða settir.

Frá kl. 17.30 til 19.30 verða tiltøk um og við íblástri frá **Pokemon GO**. Stuttar framløgur, tiltøk og undirhald.

Frá kl. 20.00 verður hugnakvøld við framløgum og undirhaldi.

Vísindavøkan verður eisini á ferð kring alt landið við fyrilestrum í døgunum **19.-29. september**. Fleiri enn **50 fyrilestrar** eru á skránni.

Tað eru granskingarstovnarnir og Granskingarráðið, sum skipa fyri. Øll tiltøkini eru ókeypis. Sí skránna og les meira á gransking.fo og á **Facebook-síðuni hjá Granskingarráðnum**.

fá børn siga nógv orð, tá tey eru 12 mánaðir. Tað er ymiskt, nær børn byrja at tosa, og tað er ymiskt, hvussu tey skilja. Tað er týðiligt, at tað er lættari hjá børnum at læra navnorðini heldur enn at seta orð á handlingar og kenslur.

– Tað er púra normalt ikki at siga nakað, tá barnið er eitt ár ella hálvtannað, men man skal sum foreldur fylgja við. Tá tey eru millum hálvtannað og tvey ár fara tey flestu inn í ein orðaspurt, sum setir ferð á orðfeingið. Men so eru tað hesi, ið framvegis duga færri enn 25 orð ella so, sigur hon og vísir eina stabbamynd, har ein lítil bólkur av børnum liggur.

## Orð hava áhuga

1200 børn eru við í kanningini hjá Sissal, sum hevur fingið stóra undirtøku millum foreldrini, ið hava luttikið.

– Hetta er avgjørt eitt evni, ið foreldur eru áhugað í. Fyri tey er tað sjálvsagt grundleggjandi at fáa samskift við børnini. Og tað er sjálvsagt gott, tá tað gongur børnunum væl, men vit skulu eisini finna út av nær og hvussu, vit skulu seta inn fyri at hjálpa, har sum tað ikki gongur væl. Málið hevur nógv at siga í tí sosiala partinum, til dømis tá børn skulu spæla leiklutaspøl. Man sær ofta, at tey børnini, sum ikki tosa so væl, fáa leiklutin sum hundurin í spælinum.

Sissal vísir á, at tað eru nógv ymisk viðurskifti í sambandi við máltøku, ið gera seg galdandi. Eitt nú skulu børn læra, at orð hava ymsar týdningar, og at tey kunnu nýtast á ymiskar mátar.

– Til dømis orðið, sum børnini hoyra úttalað »vevur«. Hetta orðið merkir vegur at koyra á, vevur at veva við og veður til dømis regn, men orðið ljóðar fyri børn eins. Tey læra eisini, at eitt nú ein koppur ikki bara er ein ávísur grønur koppur, men at hann kann hava ymisk skap og vera reyður, bláur ella gulur.

– Eitt annað dømi eru bendingar. Barnið skal læra, at »skógvur« og »skónum«, er sama orð, ið tey sum hugtak skulu kenna aftur, men tað eru ymsir bendingarformar av sama orðið. Og tað skal barnið læra. So tað er ein stór uppgáva hjá barninum. Eitt annað dømi eru fleiri orð, sum merkja tað sama, eitt nú »rutsjibani« og »skreiðibreyt«. Tað er ein onnur diskussión, men í sambandi við tað havi eg spurt, um foreldrini siga »skreiðibreyt«, tá tey lesa fyri børnunum, ella um tey brúka »rutsjibani«, tí her læra børnini, at tað eru tvey ymisk orð fyri sama hugtak.

## Føroyskt tilfar manglar

Vit brúka okkara mál hvønn dag til at søkja og skapa samband, at miðla, at siga hvørji vit eru og so framvegis. Børn uttan væl ment mál kunnu fáa trupulleikar har. Tí er umráðandi at tosa nógv við børnini, fyri at geva teimum bestu fyritreytir fyri at mennast.

– Eitt er, tá børnini eru heima, og vit tosa um heimlig ting, men tá ið tey koma í skúla, er tað sum ein annar heimur fyri tey. Og tað er hetta, sum hevur mín áhuga, sjálv máltøkan og lesiførleikin hjá hesum børnunum seinni.

– Tú skalt jú hava eina djúpari fatan av einum orði fyri eitt nú at kunna lesa lívfrøði, og til tað krevst, at tú hoyrir orðini ofta.

Tær nógv umrøddu pisa-kanningarnar eru ein mátistokkur, ið kann siga nakað um lesiførleikan hjá ungum, men Sissal vísir á, at tað kunnu vera fleiri frágreiðingar til úrslitini frá pisa.

– Mínar kanningar vísa ikki, at smærri føroysk børn sum heild hava trupulleikar. Men sjálvandi kann okkurt gerast betri. Vit hava til dømis lítið av upprunaføroyskum tilfari til sjónvarp og útvarp og fáar appir, youtube-kanalir og podcasts, sum eru ein partur av gerandisdegnum hjá børnum og ungum í dag.

## Íkast til víðari gransking

Tað verður ofta sagt, at vit føroyingar ikki siga so nógv. Men vit hava ofta nógvar tættar relatiónir, sum ger at vit hava nógv samskifti við fólk í tí dagliga. Men av fleiri orsøkum er ilt at samanbera føroyskt við málini rundan um okkum. Til dømis er danskt trupult, tí ljóðið er so ymiskt frá tí føroyska.

– Danskt er rættiliga ótýðiligt í sínum hjáljóðum, og tað er ikki so lætt at hoyra munin á ljóðunum hjá lítla barninum, sum skal læra seg málið. Harafturímóti er tað svenska heilt øðrvísi, og kanningar vísa eisini, at tey norsku og svensku børnini hava tað lættari enn donsku børnini við at læra sítt móðurmál fyrstu árini.

Máltøka hjá børnum er eitt evni, sum verður væl granskað úti í heimi. Aðrastaðni vera EEG-kanningar gjørdar av pinkubørnum, sum kunnu avdúka, um tey skilja munin á bamsu og bólti heilt tíðliga.

– Hyggur barnið eitt sindur longri eftir tí rætta, fer ein grøn pera at lýsa. Slíkar hættir hava vit ikki møguleika at nýta í Føroyum, og tí havi eg lagt meg at einum viðurkendum og nógv brúktum háttalagi, sum verður nógv brúkt aðrastaðni, og sum ger, at eg kann sammeta míni úrslit við úrslit í øðrum londum og málum.

Úrslitini av kanningini hjá Sissal skulu nýtast til tríggjar greinar, og ritgerðin skal verjast á Syddansk Universitet. Eftir ætlan skal tilfarið savnast, so tað eisini kann brúkast á føroyskum.

– Hetta er eitt spennandi evni at sita við. Ikki einans gevur kanningin okkum ítøkilig úrslit, sum ikki hava verið tøk áður, men eg kann eisini lesa nógv áhugaverd rák í hesum úrslitunum. Eitt nú kann tilfarið vera íkast til áhugaverdar diskussiónir um kyn og málbrúk, sum kunnu peika á ávís rák í samfelagnum, og sum kunnu vera áhugaverd at granska víðari í, sigur hon at enda.

## Um verkætlanina:

*Ph.d-verkætlanin hevur til endamáls at gera eina skipaða og empiriskt grundaða lýsing av, hvussu føroysk børn menna málið, og sum kann brúkast sum normur, til dømis tá metast skal um málførleika.*